# Bárður fer til Gjáar at mála

**Bárður Jákupsson, leiðari á Listaskálanum, er í holt við at rigga sær eitt atelier til við Gjógv. Her ætlar hann at nýta nógvu tíðina hann fær, tá hann gevst sum leiðari av Listaskálanum**

LIST
*Ingrid Bjarnastein*

Leiðarin á Listaskálanum, Bárður Jákupsson, er í holt við at rigga sær eitt atelier til við Gjógv.

– Eg havi longu eitt atelier í Hoyvík, men tað er ov lítið, so eg havi valt at fáa mær eitt afturat, sigur Bárður Jákupsson.

Kona Bárð, Hervør, er úr Gjógv, og húsið, har atelieri er, er knýtt at barndómsheimi hennara.

– Eg komi nógv til Gjáar, og mær dámar væl har. Tú kanst altíð koma til Gjáar. Tað er landfast og vegasamband, og har er eisini deiliga friðarligt.

Nú tá Bárður Jákupsson fer at gevast sum listasavnsleiðari, fer hann at hava munandi betri stundir til at tekna og mála.

– Tá eg gevist ætli eg bara at tekna og mála. Tað er tað, sum eg altíð havi viljað, sigur Bárður Jákupsson.

Ikki er vist enn nær Bárður Jákupsson fer úr starvi, sum listasavnsleiðari.

– Starvið fer at verða lýst leyst í næstum, og vit vóna, at ein nýggjur leiðari kann setast um ársskiftið, sigur núverandi listasavnsleiðarin at enda.



*Bárður Jákupsson, sum starvast sum listasavnsleiðari í løtuni, er í holt við at rigga sær atelier til við Gjógv. Her fer hann at brúka nógva tíð tá hann fer at gevast sum leiðari*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Ítróttar- og mentanardagur bæði væl- og miseydnaður

**Mikudagin var ítróttar- og mentunardagur í Havn fyri øllum lesandi í miðnámsskúlunum kring landið**

ÍTRÓTTARDAGUR
*Sólrun Hansen og Anja Brekkstein, praktikkantar*







Mikudagin var skipað fyri ítróttar- og mentanardagi fyri miðnámskúlalesandi í Havn.

LFÚ skipar fyri tiltakinum saman við teimum ymsu miðnámsskúlunum. Vit hava tosað við Brynhild Poulsen, sum er skrivari og samskipari hjá LFÚ.

Av tí at ikki var boða frá afturmeldingum, miseydnaðust summi tiltøk. T.d. gekk miðlatiltakið ikki eftir ætlan, av tí at ov nógvir næmingar vóru, men harufturmóti eydnaðist rundvísingin væl. Um tiltakið verður aftur í næsta ár, dugir Brynhild ikki at siga.

– Tað er eitt stórt arbeiði at fyrireika eitt líknandi tiltak, og tað skulu nógvir fyrireikarir til, sigur Brynhild Poulsen.

Dagurin byrjaði klokkan 09.30, har Turið Christophersen, formaður í LFÚ, setti dagin. Klokkan 10.00 fóru tey í bólkar og so til øll tiltøkini, sum vóru ymsastaðni runt í Havnini. Aftaná tiltøkini, møttust allir næmingarnir niðri á Tórsvølli, har ið Poul Michelsen handaði heiðursmerkini.

## Eisini fyri brekað

Vit spurdu Drós Djurhuus, lesandi í studentarskúlanum í Havn, hvat tiltak hon hevði valt, og hvat henni dámdi dagin

– Eg valdi tiltak nr. 1, sum er rundvísing í Tórshavn og Hoyvík. Gongutúrurin var við Ingigerð, sum ferðaleiðara, og hann byrjaði uttanfyri Kunningarstovuna. Fyrst varð farið oman á Kongabrúnna, og frá Kongabrúnni gekk leiðin niðan á Tinganes, Reynagarð, eftir Reyni, Mettustovu, Bringsteinsgøtu og endaði niðri á Vágsbotni. Síðani fóru vit við bussi niðan til Føroya Fornminnissavn, og oman í Hoyvíkina har Regin Debes greiddi frá ymiskum.

–Tað hevur verið sera stuttligt og spennandi, men tiltakið kundi verið betri fyriskipað. Kanska er tað tí, at tað er fyrstu ferð, at eitt líknandi tiltak verður gjørt á hendan hátt, sigur Drós Djurhuus.

Í fjørð var tað bara ítróttur á skránni. Tað vil siga, at tey, ið høvdu eitt brek ella ein skaða, kundu ikki vera við. Men í ár eru tað onnur tiltøk, har tey sum hava brek ella skaða, kunnu vera við.

Eisini spurdu vit Rannvá Holm Jacobsen, hvat hon helt um tiltakið.

– Eg haldi, at tiltakið var áhugavert, men ov illa fyriskipað. Eg var sett á skeivan lista, og var tí enda í miðlatiltakinum. Vit vóru runt í Havnini og vitjaðu fjølmiðlar. Eg haldi, at vit vóru alt ov nógv í bólkinum og fingu tí ikki alt við, sum var sagt.

– Sjálvt um tað var ein áhugaverdur dagur, veit eg nú, at eg ongantíð fari at verða journalist, sigur Rannvá at enda við einum stórum smíli.



# Ferðamynstrið hjá svartkjafti er eitt loyndarmál

**Tað er eftir øllum at døma torført at gerast klókur uppá svartkjaft. - Ymiskt er, hvussu svartkjafturin ferðast, tá ið hann er um okkara leiðir. Gongdin er ongantíð hin sama, og einki ár er mynstrið eins, sigur Hans Klakkstein, sum førdi Christian í Grótinum seinasta túr.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Her leggur Christian í Grótinum til bryggju í Klaksvík.*
Mynd: Rúna Sivertsen

Miðskeiðis í vikuni var Chr. í Grótinum á Klaksvík við fullum skipi av svartkjafti. Veiðan, sum øll var fingin í føroyskum sjógvi, vá 2.000 tons; tá er skipið fult undir lúkurnar og kanska eitt sindur meira enn tað.

Skipari hendan túrin, var klaksvíkingurin, Hans Klakkstein. Hann er vanliga fyrsti stýrimaður umborð, meðan Jón Rasmussen er fastur skipari. Viðhvørt avloysir Bogi Rasmussen, sum annars førir Norðborg, og onkuntíð er eisini reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, á brúnni á Christiani í Grótinum. Kristian Martin loysir eisini av umborð á Norðborg.

Hendan túrin fingu teir ikki allan fiskin undir lúkurnar umborð á Christiani í Grótinum.

- Tað var stuttur vegur at sigla av fiskileiðini, og veðrið var gott. So, hetta var eingin trupulleiki, sigur Hans Klakkstein.

Hann vísir á, at tá ið teir royna eftir svartkjafti, er ikki altíð, at alt tað seinasta hálið fæst undir lúkurnar.

- Hendan túrin fingu vit millum 300 og 350 tons um døgnið, og tað er hampiligur fiskiskapur. Seinasta hálið var tað besta; tá fingu vit sløk 400 tons.

## Fingu alt í føroyskum sjógvi

Hans sigur, at tá ið teir byrjaðu hendan túrin, royndu føroysku skipini í íslendskum sjógvi, og tað ljóðaði ikki frá nógvum.

- Vit kastaðu tó í íslendskum sjógvi, men tað gav einki. Fiskurin flutti seg rættiliga nógv tey fyrstu trý samdøgnini eftir, at vit vóru útkomnir. Tað endaði við, at vit fingu uppí skipið einar 25 fjórðingar inni á føroyskum øki. Vit fiskaðu í stívliga seks samdøgur tilsamans.

Hans sigur, at fiskiskapurin er nýtiligur, tá ið nótaskipini kunnu gera ein túr um vikuna.

- Ofta er tað soleiðis, at onkur góður dagur bjargar túrinum, men liggja dagarnir um 300-400 tons, er fiskiskapurin góður. Svartkjaftafiskiskapurin kann vera rættiliga skiftandi. Viðhvørt fæst uppí skipið eftir 2-3 døgum, og viðhvørt tekur tað eini 8-9 samdøgur at fylla skipið, sigur hann.

Hini skipini, sum eru á føroysku svartkjaftaleiðini í løtuni, eru Krúnborg, sum júst er komin á fiskileið, Tróndur í Gøtu, sum hevur roynt nakrar dagar og síðan Næraberg, sum virkar svartkjaftin umborð.

Krúnborg var á Fuglafirði fyrr í hesi vikuni við fullum skipi.

Christian í Grótinum byrjaði nýggjan túr á middegi hósdagin.

## Mynstrið broytist

Hans Klakkstein sigur, at ymiskt er, hvussu svartkjafturin ferðast, tá ið hann er um okkara leiðir.

- Gongdin er ongantíð hin sama. Einki ár er mynstrið eins.

Hann vísir á, at hesa tíðina í fjør fekst nógvur svartkjaftur á Munkagrunninum, og nú fæst hann vestur ímóti markinum.

- Einar 3 vikur herfyri var einki at fáa, men beint undan hesum, var væl at fáa í ein landnyrðing úr Fugloynni. So, tað er ilt at siga, hvar og nær svartkjaftur er at fáa, tí ferðamynstrið og fiskiskapurin eru so skiftandi

Hans Klakkstein vónar, at Christian í Grótinum fær einar 3-4 túrar aftrat, áðrenn farið verður á makrelella sildaveiði.



*Skipið er fult - ikki bara undir lúkurnar, men meira enn tað.*
Mynd: Rúna Sivertsen



*Skipari hendan túrin, var Hans Klakkstein, ið annars hevur siglt sum stýrimaður við Christiani í Grótinum í 11 ár.*
Mynd: Rúna Sivertsen

## Fýra skip landað á Tvøroyri

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hósdagin landaði Fiskavirking á Tvøroyri djúpvatnstrolaran, Steintór, og seinni sama dag skuldu tey eisini landa línuskipið, Hoyvíking. Steintór hevði sløk 90.000 pund, harav sløk 40.000 pund var kongafiskur. Hoyvíkingur hevði eisini umleið 90.000 pund, harav ein partur av veiðini var brosma. Hvørji hini fiskasløgini vóru, var ikki greitt, tá ið vit frættu av Tvøroyri fyrrapartin í gjár.

Ymisk virkir keyptu fiskin hjá Steintóri og Hoyvíkingi.

Í dag landar Vesturskin á Tvøroyri, men tá ið vit frættu, visti tey ikki, hvussu nógv trolarin hevur inni.

Sum skilst, keypir Fiskavirking veiðina hjá Vesturskini.

Tíðliga í vikuni landaði eisini djúpvatnstrolarin, Rankin, á Tvøroyri. Tey høvdu ikki tølini við hondina, tá ið vit frættu, men Fiskavirking á Tvøroyri keypti meginpartin av veiðini.

Uppí einir 30 útróðrarbátar rógva út og avreiða á Tvøroyri, tá ið viðrar - og seinastu dagarnar hevur hann yvirhøvur ligið við góðum veðri.

Útróðrarbátarnir fáa nakað av fiski, skilst.

Í Suðuroy eru tvær landingarmiðstøðir, og her kemur allur fiskurin í Suðuroy uppá land. Hesar eru Fiskavirking á Tvøroyri og Fiskamarknaður Føroya í Vági.